## Eingin valfundur við Jákupi og Jógvani

Eingin valfundur verður upp undir seinna umfarið av biskupsvalinum. Orsøkin er, at annað valevnið, Jógvan Fríðriksson, fer av landinum í morgin og verður burturstaddur í minst tvær vikur. - Tey, sum skulu velja, kenna míni sjónarmið og vita, hvar eg standi, segði hann við útvarpið í gjárkvøldið. Hitt valevnið, Jákup Reinert Hansen, ásannar, at hann hevði viljað, at teir báðir hittust saman við veljarunum undan seinna valumfarinum. Á middegi tann 31. oktober verða atkvøðurnar í biskupsvalinum taldar, og tá fæst at vita, hvørt tað verður Jógvan Fríðriksson ella Jákup Reinert Hansen, sum skal taka við eftir Hans Jacob Joensen.

## Eldri danir drekka meiri enn fyrr

Altsamt fleiri eldri danir drekka meiri, enn Heilsustýrið sigur vera ráðiligt. Talið á eldri dønum, sum drekka meiri enn tað, sum Heilsustýrið sigur vera gott, er vaksið sera nógv tey seinastu tíggju árini, skrivar Nyhedsavisen. Fyri tíggju árum síðani vóru tað 5,7 prosent av teimum, sum høvdu fylt 65, ið drukku ov nógv. í dag er talið 13,5 prosent. Næstan 5. hvør maður og næstan 10. hvør kvinna drekka meiri, enn tilráðingin frá Heilsustýrinum sigur.

# Klaksvíkar Sjúkrahús

**Í Føroyum hava vit almenn sjúkrahús, men almenna heitið fjalir yvir ein veruleika, har almenna játtanin ikki røkkur nógv longur enn til mat, medisin og lønir. Hetta staðfestir Heri Ellingsgaard, sum í gjár fekk handað gávukort frá Norðoya Sparikassa.**



*- Við tí játtan, sum vit fáa og hava fingið tey seinastu mongu árini, hevði tað ikki verið í bræði, at vit sjálvi høvdu havt ráð til at gera hesa íløguna, staðfestir Heri Ellingsgaard, umsjónarmaður á Klaksvíkar Sjúkrahúsi*

HEILSUVERKIÐ

*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Sjúklingarnir á Klaksvíkar Sjúkrahúsi kunnu nú hyggja eftir sjónvarpi uttan at fara úr songini. Men nýggju sjónvørpini eru ikki eitt úrslit av, at Heilsumálaráðið hevur uppraðfest trivnaðin, og tí hevur sett pengar av til sjónvørp.

- Við tí játtan, sum vit fáa og hava fingið tey seinastu mon-gu árini, hevði tað ikki verið í bræði, at vit sjálvi høvdu havt ráð til at gera hesa íløguna, staðfestir Heri Ellingsgaard, umsjónarmaður á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.

Hugskotið til nýggju sjónvørpini eigur Arthur Gudjonson úr Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag, og saman við Norðoya Sparikassa kundi hann í gjár handa sjúkrahúsleiðsluni eitt gávukort á 150.000 krónur.

Heri Ellingsgaard, umsjónarmaður á Klaksvíkar Sjúkrahúsið, sigur at sjónvørpini koma væl við og fara at økja um trivnaðin á sjúkrahúsinum. Og sum hann sigur, so hevði hend íløgan ikki komið í lag uttan privatan stuðul, tí tørvur alla tíðina er á øðrum bráneyðugum tólum, og pengar eru ongir.

### Privat fíggjað tól

Sjónvarpsgávan er ikki fyrsta privatfíggjaða íløga hjá Klaksvíkar Sjúkrahúsi. Norðoya Sparikassi hevur fyrr verið inni í myndini, ein kvinnubólkur fíggjaði einaferð ein ultraljóðsskannara, og aðrir felagskapir hava givið smærri gávur, sum til dømis leikur til børnini.

- Fyrr í ár heittu vit á Norðoya Sparikassa um at stuðla keypi av einum hjartatóli, sum skuldi brúkast